

# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 24
Apríl 2015

ISSN 1603-0036

**Nýggjar frímerkjaútgávur:**
- Átrúnaður í víkingaøld
- Gamli Bókahandil 150 ár
- Sepac 2015: Bindilist
- Jólaevangeliið 3
- Postgjaldsmerki 2015

Posta
FAROE ISLANDS




FO 814-816 Royndarprent

# Átrúnaður í víkingaøld

Tá rómverska veldið var størst, rakk tað heilt til Onglands, men tað fevndi ongantíð um Norðurskotland, skotsku oyggjarnar umframt økini norðanfyri og eystanfyri Rínánna og Donau á meginlandinum og harvið heldur ikki Skandinavia.

Umleið ár 400 e.Kr. varð veldið býtt sundur við Adriatarhavið. Vestara økið varð í 400-árunum býtt upp í fleiri kongsríki, har merovingaríkið var tað týdningarmesta. Rómverska kirkjan, umboðandi meginlandskristindómin, kom til Onglands stutt fyri ár 600 og breiddi seg víðari á meginlandinum. Umleið ár 800 við byrjanina av víkingaøld var karolingaríkið stórveldið á meginlandinum. Fornfrøðiligar og søguligar keldur bera boð um eina víðkan av karolingaríkinum bæði innan bygging, framleiðslu og handil umframt politiska, hernaðarliga og kirkjuliga skipan. Í 900-árunum gjørdi kristnanin sína innrás í Danmark.

Í keltisku vesturlondum hevði kristindómurin longu fingið fastatøkur seinast í 300-árunum. Hesin kristindómurin hevði røtur í fyrstu kristnum samfeløgum í eystara parti av Miðjarðarhavsøkinum. Her leitaðu kristin sær frið og einsemi á fjarum støðum fyri at kunna halga seg tilbiðjanini av Gudi. Kristna mentanin í Írlandi varð ikki stórvegis ávirkað av hendingunum á meginlandinum og kundi tí varðveita sínar siðir og bygnað, grundað á kleystur. Kristin úr Írlandi eru helst komin til Føroya longu áðrenn víkingaøld.

Seinast í 700-árunum fingu skandinavisku samfeløgini samband umvegis Eystrasalt til útnyrðingsrusland og víðari suðureftir har Norðurevropa fekk samband við ríka islamiska heimin og í 800-árunum breiddu skandinavar seg til Norðuratlantshavið.



Niðri á Toft í Kvívík.
Mynd: Ólavur Frederiksen

Í eldru víkingaøld var soleiðis eitt næstan heimsumfatandi kervið stovnað, har tíðindi, hugskot, mentanarrák, siðir, bókmentir og tónleikur nú kundu ferðast skjótari enn nakrantíð áður. Á ein hátt varð heimurin vorðin minni, og sjónarringurin hjá einstaka menniskjanum var vorðin størri.

Føroyar vóru í víkingaøld saman við hinum norðuratlantisku samfeløgunum, meginpartinum av Noregi og keltisku vesturlondunum, randøki til evropiska pallin, har skandinaviska sambandið við bretsku oyggjarnar í víkingaøld skaptu eina blandingsmentan, sum eisini kom at seta dám á norðuratlantisku fráflytarasamfeløgini. Í hesi blandingsmentan hevði kristindómurin ein stóran leiklut, bæði meginlandskristindómurin og tann írski.

Tann formliga viðurkenningin av kristindóminum umleið ár 1000, sum vit hoyra um í søguni, skal soleiðis síggjast sum prógv fyri, at man í Føroyum – eins og í Skandinavia – ynskti at vera ein partur av meginlandskristindóminum, sum tó var samantvinnaður við eitt kongsvald, sum enn ikki var til staðar í Føroyum. Írski kristindómurin var grundaður á kleystur umboðandi vanliga fólkið, meðan meginlandskristindómurin var tætt knýttur at valdsharrunum í samfelagnum.

Í Føroyum vita vit stórt sæð onki um heidnar gravir frá víkingaøld, sum í t.d. Íslandi og kann hetta benda á at landnámsfólk í hesum tíðarskeiði í høvuðsheitum vóru kristin. Mongu bønhúsini, sum leivdir eru eftir í Føroyum, skulu helst fatast sum privatar kirkjur, bygdar av fyrstu kristnum íbúgvum í Føroyum. Enn hevur onki av



Tíðliga í miðøld
Krossteinur úr Ólansgarði í Skúvoy.



Víkingaøld
Botnur úr laggaðum træílati.
Funnin niðri á Toft i Kvívík.



Víkingaøld
Vaðsteinur við íhøgdum St. Hans krossi.
Funnin við Gjóvará í Fuglafirði.

*Kelda: Fornminnissavnið*

hesum bønhúsum verið fyri fornfrøðiligum kanningum, men royndir frá hinum norðuratlantisku fráflytarasamfeløgunum benda á, at tey eru úr víkingaøld og hava møguliga havt smáu kleystrini í írska kristindóminum sum fyrimynd. Tveir kristnir trækrossar av írskum sniði funnir á Toftanesi í Leirvík kunnu tíðarfestast til tíðina áðrenn almennu kristnanina og byggja sostatt á ta áskoðan, sum her verður borin fram.

Kristnir krossar við ymiskum sniði, høgdir inn í gravsteinar og steinamboð ella skornir í træ eru funnir á fleiri støðum frá víkingaøld og tíðliga í miðøld í Føroyum og eru áhugaverd ítøkilig prógv um fyrsta kristindómin her á landi.

*Steffen Stummann Hansen,*
*fornfrøðingur*







FO 817 Royndarprent

# Sepac 2015: Bindilist

Ongin veit nágreiniliga, nær fólk fóru at binda ella hvaðani binding stavar, men staðfestast kann, at ullin hevur havt stóran týdning í Føroyum líka síðani landnámstíðina. Oyggjarnar eru nevndar eftir seyðinum, sum gevur okkum ullina. Seyðaoyggjarnar, sum víkingarnir úr Noregi nevndu tær.

**Ull er Føroya gull**

Eitt gamalt orðatak sigur at "Ull er Føroya gull". Hetta orðatakið sigur nakað um lívið í Føroyum í gomlum døgum. Ullint pløgg, bæði vovin og bundin, t.d. hosur og troyggjur, vóru høvuðsframleiðslan í øldir og í nógvum førum einasta inntøkukeldan.

Fólk livdu av jørðini og jørðin gav seyð í túsundatali. Seyðakjøtið varð til egið brúk og ullin varð seld. Uml. 1880 livdu meira enn 80% av Føroya fólki av seyðahaldi.

Bæði menn og kvinnur brúktu kvøldini til at virka ullintar vørur. Húsfólkini sótu fram við veggjunum í berligu roykstovunum og bundu og spunnu, meðan sagt var frá søgum um trøll og huldufólk og gomlu kvæðini vórðu kvøðin.

At siga frá, at syngja og at arbeiða við ullini er alt tætt knýtt saman. Onkur vil verða við at kvæðini og søgurnar, sum eru hornasteinarnir í føroyskari mentan, als ikki høvdu yvirlivað, var tað ikki fyri arbeiðinum við ullini.

**Bindiklubbar**

Í Føroyum er tað sera vanligt at kvinnur, bæði ungar gentur og gamlar konur, ganga í bindiklubb. Man savnast í heimunum hjá einum av limunum eina ferð um vikuna ella 14. hvønn dag og so skiftist man um at vera vertur. Bindiklubbar eru eitt forum, har man kann býta um mynstur og uppskriftir og vísa fram tey



lidnu pløggini - eitt hugnaligt kvøld við práti og sleygi.

Um summarið fara fólk í túsundatali á tónleikafestivalarnir at lurta eftir føroyskum og altjóða tónleikabólkum. Vanligt er at verða í ymiskum sløgum av skipstroyggjum og av pallinum sæst eitt satt hav av mynstrutum troyggjum við íblástri úr aldargamlari føroyskari bindisiðvenju.

**Bundin list**

At binda til onnur endamál enn klæðir, hevur verið sera óvanligt í Føroyum inntil fyri heilt stuttum. Bundið varð einans til praktisk endamál, tað skuldi verða nýtiligt og sera sjáldan bert sum list við einum estetiskum endamáli.

Men undantøk eru, m.a. hevur Randi Samsonsen víst okkum at binding kann brúkast til list eins væl og klæðir. Nakað av nýggjastu bundnu listini er tilevnað av Randi Samsonsen, sum í 2012 tók prógv sum Master of textile Design við Designskolen í Kolding. Hon brúkar binding sum eina listagrein fyri at bróta tær avmarkingar, sum kunnu verða í binding. Randi heldur at hetta gamla handverkið, sum hevur gingið í arv í fleiri ættarlið, ger okkum før fyri at finna nýggjar slóðir og siga søgurnar umaftur á ein annan hátt.

**Bindifestivalur í Føroyum**

Sum nakað nýtt, so varð fyri fyrstu ferð skipað fyri bindifestivali í Føroyum. Bindifestivalurin varð hildin í Fuglafirði, sum í tríggjar dagar í apríl 2015 varð umbroyttur til ein stóran bindiklubba. Workshops í privatum stovum, bindikafé og felagshugni var á skránni allar dagarnar.

Í nógv ár hevur verið hugt niður á handverkið binding, meðan sniðgeving hevur verið mett hægri. Men tey hoyra saman, sum tvær síður



av somu søk. Tílík handverk verða nú virðismett í størri mun. Tað er gleðiligt at síggja. Í eini tíð har nógv av okkum brúka dagin framman fyri telduni, hava nøkur okkara tørv á at skapa, at nema og gera okkurt ektað, rátt og vakurt. Flestu fólk hava tørv á at verða sædd, sum nakað serligt, og tað gevur binding okkum møguleika til. Sjálvt eitt plagg, har bindiuppskriftin verður fylgd nágreiniliga, vil altíð verða nakað serligt og unikt, tí tað er handbundið. Binding kann viðmælast kvinnum í øllum aldri og úr øllum samfelagsløgum. Tað er so lætt at hava eitt noða í handtaskuni, og tað eru ongi mørk fyri, hvat kann virkast burtur úr tí.

*Kelda: "HNJ's Ultimative Guide til Færøerne, Færøsk strik" 2011.*



Design: Jóhanna av Steinum










FO 818-819

Royndarprent

# Gamli bókahandil 150 ár

H. N. Jacobsens bókahandil er eitt hitt mest sermerkta staðið í Føroyum. Uttanfyri standa gomlu trøini frá 1870inum, ið eyðmerkja hendan týðandi stovnin fyri føroyskar bókmentir, prentsmiðju- og forlagsvirksemi. Her var gamli realskúlin, inntil H.N. Jacobsens Bókahandil varð fluttur niðan her í 1918 frá gomlu hølunum í Gongini, har fyritøkan helt til frá 1865. Í ár eru 150 ár síðani fyritøkan varð stovnað.

H. N. Jacobsen stendur fyri Hans Nicolai Jacobsen (1832-1919). í dagligari talu kallaður Hans Nikl ái. Tá hann doyði tók dóttirin Sigrid Jacobsen Niclasen (1854-1927) yvir og gjørdist eigari av handlinum. Seint í 20. øld varð handilin og alt virksemi í honum skipað sum ein grunnur og er tað enn í dag.

**Frá bókbindara til bókhandlara**

Hans Nikl ái var evnaríkur. Sum ungur gjørdist hann jekari; hetta var í 1849 (jekarar vóru soldátar á Skansanum í Havn). Men skjótt fór hann at læra seg onnur fak. Amtmaðurin, Carl Emil Dahlerup (1813-1890) vildi stuðla Hans Nikl áa, tí hann var farin at innbinda bøkur. Amtmaðurin vildi hjálpa honum at koma til Keypmannahavnar at læra bókbinding, tí hann helt, at Føroyum vantaðu serfrøðingar: *"Et føleligt Onde her paa Øerne er den store Mangel paa blot nogenlunde duelige Professionister"*. Í 1854 slapp Hans Nikl ái til Danmarkar.

**Eitt vaksandi bókmentaligt almenni**

Í árunum undan ferðini til Danmarkar, var eitt umhvørvi við at vaksa fram í Føroyum, ið bæði vildi stimbra vinnuligum átøkum og hitt andaliga lá heldur ikki á láni. Menn sum Jens Davidsen og onnur birtu eitt lesifelag. Bókasavn varð stovnað í Havn í 1828 hjálpt av føroyavinum og norðurlendskum mentafólkum sum Rasmus Rask og Carl Christian Rafn og øðrum - hesir stovnaðu eisini bókasøvn í Íslandi og í Grønlandi. Soleiðis vóru føroyskar bókmentir settar




H. N. Jacobsens Bókahandil
Mynd: Ólavur Frederiksen.

á kortið, kanska serliga av ferðandi vísindafólkum og fólkum við áhuga fyri kvæðum, ævintýrum og munnligari mentan. Útgávan av Sjúrðarkvæðunum (1822) og Føroyasøga (1832) vaktu ans í Føroyum og kring alt Europa, har eitt nú hin kendi lærdi týskarin Jakob Grimm skrivar ummæli av hesi fyrru bókini.

Um hetta mundið í Havn og í Føroyum sum heild var fólkatalið vaksandi. Regluligur skúli varð skipaður, ið økti eftirspurningurin eftir bókum og øðrum tilfari. Fólk bóðu tí bókbindaran fáa sær bøkur. Hans Niklái gjørdist limur í Den Danske Boghandlerforening í 1864 og í november sama ár fekk hann handilsloyvi. Sjálvur segði hann seg hava stovnað bókahandilin ólavsøkudag 1865. Í árunum frá 1864-1906 – gott 40 ár – var hann stjórnarlimur í Føroya Amts Bókasavni.

**Fyrsti Handilin í Gongini**

Í "Tann deiliga Havn" skrivar William Heinesen um gamla handilin: *"Her laa ogsaa bogbinderens handel. En høj trapppe førte*



*op til dette røde eventyrhus hvor man kunde købe "aftrykningsbilleder" og store ark med papirsoldater. ...det var som at skue ind i et af Tusind-og-en-nats eventyr fra Østerland."* Skjótt gjørdist ov trongt og hjúnini fluttu inn í hús nær við. Hans Niklái byrjaði at virka sum forleggjari og sum útgevari.



Hálendsk ferðafrásøgn „De Faröer De Aarde en haar Volken“, 1907

Í 1918 flutti handilin við øllum virkseminum har handilin hevur húsast.

**Gamli bókahandil**

Tað er áhugavert at kanna hvat bókahandlar seldu í Danmark um hetta mundið. Ein miðal bókahandil í einum provinsbýi, seldi alt frá pappíri til fínt tapet og skjótt fóru nógvir eisini at taka fotomyndir av fólkum, tað sama ger seg galdandi við H.N. Jacobsens bókahandli, ið eisini við tíðini fekk sítt egna fotoatelier og prentsmiðju.

Í eini grein í *Det Danske Bogmarked* frá 1950unum um fyritøkuna skriva tey, at 30 fólk arbeiða á H.N. Jacobsens bókahandli. Handilin selur bøkur (danskar, føroyskar og útlendskar), pappír, fyllipennar, myndir; tey hava fotografiskt atelier og selja eisini grammofonplátur, postalín og glas, leðurvørur og leikur, og sjálvandi er fyritøkan ein umráðandi prentsmiðja og forlag eisini. Forlagið hevur givið nógvar týðandi bøkur út. Eitt nú seinni útgávur av *Færøske folkesagn og æventyr* hjá Dr. Jakobsen, ið var sonur av húsinum.

Bæði provisoriumerki og pengaseðlar vórðu prentað á H.N. Jacobsens Prentsmiðju.

H. N. Jacobsens bókahandil ein av Føroya elstu fyritøkum; virksemið í hesum stovninum hevur verið við til at skapt føroyska mentan, tí er tað umráðandi at Posta minnist H.N. Jacobsens Bókahandil og Hans Nikláa, og tann týdning hann hevur havt fyri at menna føroyska tilvitið um okkara egna mentanararv og undirkervið í einari vaksandi skriftmentan.

*Kim Simonsen,*
*Ph.d og Mag. Art*













Royndarprent

# Postgjaldsmerki 2015: Provisoriumerkini frá 1940-41

Í sambandi við at tað tann 1. apríl 2016 eru 40 ár liðin síðan føroyska postverkið varð sett á stovn gevur Posta út postgjaldsmerki við teimum sjáldsomu provisoriumerkjunum, sum vórðu nýtt undir øðrum heimsbardaga.

Hesi yvirstemplaðu frímerki vórðu tikin í nýtslu á heysti í 1940. Orsøkin var avbyrging í mun til restina av ríkinum, har einasta sambandið út í heim var við Bretland og lutvíst Ísland.

Prentsmiðjan hjá H.N.J. Bókahandli fekk ein virknan leiklut, tá avgerð var tikin um at yvirprenta tey fyrstu frímerkini á heysti 1940.

Tvey ørk, reytt 15 oyru "Karavel" vóru nýtt sum royndarørk, har eitt 20 tal var prentað yvir 15 talið. Hesi royndarprent miseydnaðust, tí mett var at yvirprentið sást ov illa. Tískil var ein bjálki settur undir 20 talið, tá tey 1399 ørkini vórðu prentað. Hesi vóru seld fyrstu ferð 2. november 1940.

Ein longri grein um hesa áhugaverdu søgu kemur í næsta blað.

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | Postgjaldsmerki 2015: Provisoriumerki 1940-41 |
| Útgávudagur: | 01.10.2015 |
| Virði: | 4 x 8,50 DKK |
| Stødd: | 22,5 x 55,0 mm |
| Prentháttur: | Flexoprent |
| Prentsmiðja: | Ganket, Danmark |







FO 820-821 Royndarprent

# Jólaevangeliið 3
# At leita eftir meining og tryggleika

Vísmenninir leita eftir friðarkonginum Messiasi. Maria og Jósef flýggja undan krígskonginum Heródesi. **Myndirnar eru sterkar súmbolskar lýsingar av menniskjum, sum leita eftir meining og tryggleika, men sum samstundis flýggja undan óndskapi og kríggi.**

Fyrra frímerkið lýsir teir tríggjar vísmenninar á longu oyðimarkarferðini úr Eysturlondum til lítla býin Betlehem. Teir eru troyttir, steðga á, stíga av kamelunum, og hvíla seg. Teir eygleiða stjørnuna - vísdómin í erva, sum leiðir teir. Teir eru vísir, tí ferðast teir á kameli. Kamelurin var lívsneyðugur. Frá honum fekst mjólk, ull at spinna til klæði, kjøt at eta, skinn til skógvar og vínsekkir, klæði, ókeypis flutningur langar leiðir, og orka at draga plógvið. Handan kamelin leitaði hann sær skugga í sólini og vernd í kríggi; kamelurin kundi bera 600 kg, sína egnu vekt. Hann kundi um neyðugt drekka saltvatn og klára seg uttan vatn í 40 dagar. Men tá kundi hann drekka einar 130 litrar í einum eftir 15 minuttum. **Vísmenninir vóru eisini andaliga vísir, tí spyrja teir:" Hvar er kongur Jødanna, sum føddur er? Tí vit hava sæð stjørnu Hansara har eysturi og eru komnir at tilbiðja Hann."** Myndin gevur okkum eina dupulta innliving – áhaldandi leiting inn í framtíðina og djúphugsan í nútíðini. Vísmenninir eins og tú og eg eru á ferð ímóti málinum; lívið er ikki bert ein meldur í klingur. Nøkur siga, at endamálið hevur ongan týdning, tað er sjálv ferðin, sum er altavgerandi. Soleiðis er ikki hjá vísmonnunum. **Ferðin er spennandi, júst tí hon hevur eitt endamál. Hetta er ikki tann absurda ferðin við ongum endamáli. Nei, endamálið gevur vísmonnunum íblástur og styrki til nýggjar ferðir.**

Um hetta mundið væntaði mannaættin ein friðarkong, ein Messias, sum kundi lyfta menniskju burtur úr vónloysi og líðing.



Evangelisturin Matteus leggur dent á, at vísmenninir ikki vóru jødar, men úr fremmandum landi; teir leita eftir einum friðarkongi, sum ikki bara er avmarkaður til at tæna einum lítlum, lokalum, jødiskum minniluta. **Vísmenninir umboða leitandi mannaættina, teir eru globalir.**

At teir høvdu sæð stjørnuna har eysturi vísir, at teir vóru sannir, spyrjandi stjørnu-granskarar, sum leitaðu eftir sannleikanum. Teir vóru annaðhvørt úr Persia ella Suður-arabia. Granskarar hava staðfest, at astronomiska fyribrigdið, sum vísmenninir sóu, hendi júst, tá Jesus varð føddur. Vísmenninir komu fyrst til Jerúsalem og hittu Heródes Kong hin Stóra (37 – 4 f.Kr.). Rómverska senatið hevði kosið hann til kong í Judea. Heródes umboðar politiskan harðskap. Hann drap konu sína, tríggjar synir, vermóðurina, svágin, mammu-beiggjan og mong onnur, umframt øll dreingjabørn í Betlehem. Samstundis var hann stóri byggimeistarin. Hann bygdi sjónleikarhús, amfiteatur og stórar borgir, t.d. Massada, umframt templið í Jerúsalem. Ótti kom á Heródes og á alt Jerúsalem við honum, tá hann hoyrdi um friðarkongin Messias. **Søgan vísir, at í boðskapinum um Kristus finst eitt veruligt alternativ til alt annað vald; alternativið er friðar- og kærleiksvald Kristusar. Hetta vald og ríki stýrir hjørtum menniskjanna; tí sigur Jesus "ríki Guds er innan í tykkum".** Eitt ríki, sum onki politiskt vald kann beina fyri. Hesum ríki leita vísmenninir eftir.

Tað hoyrist á svikaorðum Heródesar, hvussu egoistiskur politikkur kann vera. Hann letst at stuðla vísmonnunum. At síggja stjørnuna har eysturi var ikki nóg mikið. Heródes kall-aði høvuðsprestar og skriftlærdar saman at kanna málið. Teir staðfesta sambært orðum profetanna, at ein friðarkongur skuldi verða

føddur í Betlehem. Vísmenninir lurta eftir hesi vegleiðing, fara beina leið til Betlehem og síggja brádliga stjørnuna aftur. Tá hendir undrið á lívsferðini, sum øll menniskju kunnu uppliva - teir gleðast, undrast, tilbiðja og ofra. **Vit lesa:" Táið teir sóu stjørnuna, gleddust teir ómetaliga. Teir fóru so inn í húsið og sóu barnið og móður tess, Mariu; og teir fullu niður og tilbóðu tað og lótu upp goymslur sínar og ofraðu tí gávur: Gull, roykilsi og myrra".** Matteus leggur dent á, at lívsferðin ikki bara hevur til endamáls at loysa náttúruvísindaligar spurningar, men at læra at liva í trúgv á friðarkongin við virðing fyri teimum smáu og veiku.

Vísmenninir fáa dirvi til ikki at akta valdsharran Heródes, teir velja aðra leið heimaftur. Tí eru teir fyrimyndir okkara.



Myndin av Mariu og Jósefi lýsir menniskjað í tí kjarnumynstri, vit øll eru fødd í. Vit verða hugtikin av samanhaldinum og tryggleikanum í familjuni, hóast tey flýggja undan óndskapinum. Øll trý fylgjast og halda saman; Maria hevur barnið í føvninginum, Jósef styðjar seg við stavinum og leiðir asnan. Hóast deyðshóttan svíkja tey ikki hvørt annað. Tey verða eisini leidd av hægri guddómligum vísdómi. Tey flýggja til Egyptalands. Avbjóðingin var at vera lýðin, arbeiðssom og djørv sum familja við tí endamáli at stovna eitt nýtt heim í Nazaret. **Flýggjan Jesusar sum barn ímyndar bæði útlegd Ísraels sum ung tjóð í Egyptalandi, men eisini øll flóttafólk í dag. Tí hevur flýggjanin sterkan súmbolskan týdning – hetta er friðarhøvdingin, sum ger seg til eitt við tey flýggjandi.**

Saman geva myndirnar okkum eina sterka lýsing av grundleggjandi fyribrigdum í lívinum – leitan eftir endamáli og meining og kærleika í samanhaldi og trúfesti. **Tilveran er ikki meiningsleys og vónleys, tí í trúnni á Gud skaparan og friðarkongin Messias hevur lívið altíð endamál og innihald – tí kunnu vit hóast óndskap og líðing saman við vísmonnunum og Mariu og Jósefi gleðast, undrast, ofra okkum fyri onnur, hjálpa, geva og liva í eyðmjúkleika, trúfesti og kærleika.**

*Róland í Skorini,*
*magistari í fronskum og religiónsvísindi*

# KOM MED POST DANMARK TIL
# RIGET I MIDTEN

I samarbejde med Sinex Rejser åbner Post Danmark nu dørene til China Post for dig. Gennem de seneste fem år har vi haft et tæt samarbejde med China Post om salg af filateliprodukter, design af frimærker, uddannelse af kinesiske frimærkegravører og konsulentbistand på deres trykkeri.

Dette samarbejde har skabt masser af uvurderlige kontakter, så derfor kan vi nu tilbyde dig en unik 22-dages rejse til Kina.

## HVAD KOMMER JEG TIL AT OPLEVE?

Rejsen finder sted 23. september-14. oktober 2015. Vi lægger ud med at deltage i China International Collection Expo i Bejing sammen med 100.000 andre samlere. Så følger et par VIP-filatelistdage med besøg på det kinesiske trykkeri, hvor du kan møde gravører m.m.

Derefter kommer en guidet rundvisning på Postmuseet i Beijing og et særbesøg hos China Posts filateliafdeling.

Du kan roligt tage en ven eller partner med på turen, for er han eller hun ikke til frimærker, har vi allerede tilrettelagt et særligt program.

De sidste 15 dage er reserveret til en spændende rejse over hele Kina inklusiv udflugter, hvor du kan se alle Beijings store seværdigheder lige fra Den Himmelske Freds Plads til Den Kinesiske Mur, terracottakrigerne i Xi´an og sidst fantastiske Shanghai. En enestående oplevelse venter forude!

## LÆS MERE OM REJSEN PÅ

www.postdanmark.dk/filateli, hvor du både kan se det fulde program og læse om tilmeldingen, der finder sted gennem Sinex Rejser.

SE MERE PÅ WWW.POSTDANMARK.DK/FILATELI





# Nýggjar frímerkjaútgávur - 28. september 2015



Royndarprent

Nýggj útgáva: **Átrúnaður í víkingaøld**
Útgávudagur: 28.09.2015
Virði: 3 x 12,00 kr.
Nummur: FO 814-816
Frímerkjastødd: 34 x 25 mm
Stødd, ark: 156 x 60 mm
Snið/gravering: Martin Mörck
Prentháttur: Offsett/gravering
Prentsmiðja: Posten Sverige
Postgjaldsbólkur: Stórbrøv innanoyggja, 0-50 gr.




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Sepac 2015: Bindilist**
Útgávudagur: 28.09.2015
Virði: 17,00 kr.
Nummur: FO 817
Frímerkjastødd: 33 x 42 mm
Lagt til rættis: Randi Samsonsen
Prentháttur: Offsett
Prentsmiðja: LM Group, Kanada
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til Evropa, 0-50 gr.




Royndarprent

Nýggj útgáva: **Gamli bókahandil 150 ár**
Útgávudagur: 28.09.2015
Virði: 17,00 og 26,00 kr.
Nummur: FO 818-819
Frímerkjastødd: 30 x 34 mm
Lagt til rættis: Kim Simonsen
Snið: Anker Eli Petersen
Myndir: Jógvan á Dul / Bókahandilin
Prentháttur: Offsett
Prentsmiðja: LM Group, Kanada
Postgjaldsbólkur: Smábrøv til Evropa, 0-50 g og stórbrøv til Evropa, 51-100 g




Royndarprent

* hesi frímerki eru eisini givin út í hefti við 8 frímerkjum - fýra av hvørjum virði

Nýggj útgáva: **Jólaevangeliið 3**
Útgávudagur: 28.09.2015
Virði: 8,50 og 17,00 kr.
Nummur: FO 820-821
Frímerkjastødd: 30 x 40 mm
Tekningar: Edward Fuglø
Prentháttur: Offsett
Prentsmiðja: LM Group, Kanada
Postgjaldsbólkur: Smábrøv í Føroyum og til Evropa, 0-50 g

Framsíðumynd: Gamli bókahandil. Mynd: Ólavur Frederiksen
Snið og uppsetan: Posta Stamps. Prentsmiðja: Føroyaprent

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Find us on Facebook